# Tórður Mikkelsen



*Hvussu heldur tú jól?*
- Tað verður sum vanligt saman við familju. Tað einasta sum higartil liggur fast er, at jóladag verða vit á Toftum hjá mammu míni, og tá fara vit sum so ofta til guðstænastu í Fríðrikskirkjuni jólamorgun. Tað er ein hátíðarlig løta.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
- Vit eta dunnu jólaaftan. Eg haldi tað er tað besta. Annan av jóladøgunum hava vit ræst kjøt, og hin dagin er tað eitt sindur ymist.

*Hvat er tað besta við jólum?*
- At tey liggja hesa ársins myrkastu tíð. Vóru tey ikki her, høvdu heystið og veturin verið tung at komið ígjøgnum. Eg haldi vit hava nógv at gleðast um á jólum og tað er umráðandi at vit koma hvørjum øðrum við og geva okkum tíð til hvønn annan.

*Hvat er minni gott við jólum?*
- Komi ikki í tankar um nakað. Tey, sum altíð tosa um at tað er ov nógv res, munnu sjálvi hava ein trupulleika.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
- Nei. Onkuntíð hevur tað tó verið nær við.

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
- Tá tað kemur til jólatónleik eri eg rættiliga traditiónellur. Føroyskir sangir og sálmar, sum man er vaksin upp við, røra meg mest. Tá fái eg altíð eina góða kenslu og minnir koma fram.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
- Tað hugsi eg ongantíð um! Skal tó viðganga, at tað er hugaligt at pakka eina góða bók upp jólaaftan.



















